




# Nýggja Norðborg komin á Klaksvík

Myndirnar, vit prenta á hesi síðuni, eru tiknar, tá nýggja Norðborg kom á Klaksvík dýra biðidag.

Tað er Dávur Winther, mentanarleiðari hjá Klaksvíkar kommunu, sum hevur tikið flestu myndirnar á hesi síðu.

Á síðu 6 og 7 hava vit frásøgn frá hátíðarhaldinum, sum skipað varð fyri fríggjadagin, har hópur av fólki nýttu høvi at heilsa nýggja og stásiliga skipinum vælkomnum.

Hornorkestur spældi, og bólkurin Suð sang nakrar sangir.

Við hátíðarløtuna helt borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Gunvá við Keldu, røðu, og síðan segði reiðarin, Kristian Martin Rasmussen, nøkur orð og beyð øllum umborð at síggja nýbygningin.



